## Tailendsk kvinna bundin og kvett av toki

Ein 27 ára gomul kvinna í Tailandi varð funnin avkvett á einum tokskinnara. Hon var bundin til tokskinnararnar, á sama hátt vit best kenna úr filmum. Hendingin fór fram í Sura Thani landslutinum, tætt við býin Na Ban Na Doem Kvinnan var kvett av um tværan, og armarnir vóru bundnir í hvør sín enda av sporinum. Hennara egna troyggja varð nýtt at binda hana við. Løgreglan í landslutinum greiðir frá, at hon helst varð bukað áðrenn hon var lagt á skinnararnar, og hugsast kann at ein kærleikssøga liggur aftanfyri.



# ifti við fiskivinnuna



*Rósa Samuelsen hevur verið virkin í kommunalpolitikki, og ætlar sær at menn eitt gott samstarv við kommunurnar*



*Helena Dam á Neystabø gleðir seg at fara til verka í einum starvi, hon kennir seg væl rustaða til*

ella triðbest. Tað er eisini annað enn sjúkrahús. Tað hevur eisini verið trupult at manna kommunulæknasessirnar, at fáa tað at rigga sum tað skal. Apoteksverkið skal skipast meira modernað, og eitt afturat er barnatænastan, at fáa tað skipanina at virka við teimum kreftum, mann hevur brúk fyri.

Á tíðindafundinum vísti Hans Pauli Strøm aftur, at hann hevði borið fram ynski um at sleppa undan at fara í landsstýrið.

# Tríggir tímar til heimsins neyðstøddu

**Reyði Krossur Føroya tørvar innsavnarar - serliga í Klaksvík og Havn**

TÍÐINDASKRIVA
*Reyði Krossur Føroya*

Um tú nýtir tríggjar tímar av tínu tíð leygardagin hin 4. oktober sum innsavnari, so ert tú við í arbeiðnum at hjálpa menniskjum, sum eru í djúpastu neyð.

Reyði Krossur Føroya tørvar fólk at ganga við bússum í sambandi við landsumfatandi innsavningina av pengum um alt landið hin 4. oktober.

Meldar tú teg til at ganga ein túr við innsavningabússuni kann Reyði Krossur Føroya geva eitt nú fimm svøltandi børnum í Afrika umframt foreldur teirra mat í eitt hálvt ár. Ella kann Reyði Krossur Føroya verja 500 fólk ímóti kolera og viðgera tey, gerast tey sjúk.

Ein sera stórur tørvur er á hjálp til tey veikastu kring í heiminum. Í Burma eru framvegis stórar líðingar eftir eini av teimum ringastu náttúruvanlukkunum nakrantíð, og í eitt nú Etiopiu hóttir ein nýggj hungursstórvanlukka familjur í túsundatali.

- Serliga mangla vit innsavnarar í Klaksvík og í Havnini. Gott hevði verið, um fleiri meldaðu seg til at ganga við innsavningarbússum nakrar tímar leygardagin millum kl. 12 og 15. Eitt nú kann tað vera ein familja, íð hvør sær fer runt við innsavningarbússuni í tí økinum, har ið tey búgva, sigur formaðurin fyri Reyða Kross Føroya - Suni Vinther.

Fyri at greiða frá, hví Reyður Krossur Føroya skipar fyri innsavning, verður fyrilestur um hetta evnið í Húsinum í Klaksvík mikukvøldið 1. okt. Kl. 20.30. Fyrilesturin, har m.a. ein filmur verður vístur, sum hevur evnið: Hví savnar Reyði Krossur pening, og hvønn sendir Reyði Krossur út í heim at hjálpa.

Hetta er aðrir ferð í søgini, at Reyði Krossur Føroya skipa fyri landsumfatandi peningainnsavning við at fara fra hurð til hurð við bússum. Teir triggjar tímarnar næsta leygardag millum kl. 12 og 15 fara sjálvboðnir innsavnarar at koma til dyrnar í hvørjum húsum og savna inn pening til tey neyðstøddu í heiminum.

Aðrar staðir í Vesturheiminum fara fram líknandi innsavningar.

- Løtan fyri innsavningina er tó ymisk frá einum landi til annað. Men Reyði Krossur er jú einn heimsumfatandi felagsskapur, hvørs endamál er at hjálpa fólk í neyð, og ein part av innsavnaða peninginum her í Føroyum fara vit eftir tørvi at lata til ein altjóða grunn, sum fer at vera brúktur næstu ferð einn stórvanlukka hendur, sigur Súni Vinther.

Í Føroym eru fólk sum heild gávumild, tá ið ræður um at veita hjálp til neyðstødd.

- Mín vón er, at hetta eisini fer at gera seg galdandi, tá ið innsavningin fer fram leygardagin í næstu viku, sigur Súni Vinther.

Hevur tú hug at geva nakrar tímar til tess at hjálpa heimsins harðast raktu kanst tú melda teg sum innsavnara á telefon 283630, 243003 ella 223236.

Tú kanst eisini møta upp beinleiðis leygardagin tann 4. okt. í kommunuskúlanum í Havn kl. 11. Har verður ein hugnaløta áðrenn bússur verða útflýggjað ar og vit fara at savna inn, sigur Reyði Krossur Føroya í tíðindaskrivi.